# Jógvan við Keldu: Gevist ikki so

**-Havi eg lív og heilsu gevist eg ikki so sigur Jógvan við Keldu, sum í gjár varð loystur úr landsstýrissessinum**

UPPSAGDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Jógvan við Keldu prátar við Rúna Joensen, aðalstjóra fyri seinastu ferð sum landsstýrismaður*
*Mynd Jens K Vang*

-Eg eri væl fyri bæði likamliga og sálarliga og eisini í sambandi við tað politiska lívið. Tað eru 35 ár síðani, at eg fór upp í politikk og hevur hetta verið eitt sera spennandi lív. Havi eg lív og heilsuna, so gevist eg ikki her. Hetta sigur Jógvan við Keldu, sum tó enn ikki hevur avgjørt, um hann fer at stilla upp aftur til komandi væl. Jógvan við Keldu, sum í gjárkvøldið fekk bræv frá løgmanni, har hann loysti landsstýrismannin úr starvi, sigur seg ikki vera nakran vónsviknan mann, tí í politikki hevur tú lært, at tað er einki, sum eitur at vera vónsvikin.

Jógvan við Keldu dylur ikki fyri, at ætlanin hjá flokki sínum, tá hesin vildi hava seg at fara frá, var, at hann gjørdist taparin og flokkurin vinnarin.

Jógvan við Keldu segði annars við Sosialin stutt áðrenn hann fekk fráboðanina um, at hann var loystur úr starvi, at Fólkaflokkurin og løgmaður í eina tíð hava arbeitt við ætlanini at fáa seg frá, men sjálvur var hann ikki konfronteraður við hesum fyrr enn næstseinasta mánadag.

-Eg havi skilt, at tað í eina tíð hava verið samrøður millum Anfinn Kallsberg og løgmann um at fáa meg frá. Fólkaflokkurin vildi hava boð áðrenn landsfundin, um eg sjálvboðin vildi fara frá, men tað vildi eg ikki.

Uppá fyrispurning hví flokkurin og løgmaður vildu hava seg at fara frá sigur Jógvan við Keldu: -Eg skilji, at løgmaður og Anfinnur Kallsberg hava tosað um, at eg av og á eri komin við óhepnum úttalilsum, og tað kann eg væl geva teimum rætt í, men eg haldi ikki, at hetta hevur verið nokk til at koyra meg úr sessinum.

Jógvan við Keldu sigur annars, at tað var ein samdur tingbólkur í Fólkaflokkinum sum saman við løgmanni, ið ynskti at fáa seg frá.

### Veikt landsstýri

Jógvan við Keldu hevur ikki bara gott at siga um landsstýrið, nú hann gevst. Hann sigur, at tað er ein trupulleiki í Tinganesi, at tað gongst so illa við at taka avgerðir í fleiri týðandi málum og vísir hann her til m.a. einskiljing av Farmaleiðum og so kommunusamanlegging og annars spurningar víðvikjandi kommunum. Ein orsøkin til at hann ikki vildi góðtaka at taka seg úr starvinum var tann, at hann fegin vildi sleppa at avgreiða tey málini, sum hann var farin í gongd við.

- Eg hevði glett meg til at sitið hesi tvey árini í landsstýrinum seliga nú, tá ið tá ymisk mál eru komin a skinnaran. Smyrlamálinum komu vit nógv betur burtur úr enn mong høvdu roknað við. Útlendingamálið er sum so sett á skinnaran og kommunumál kundi man eisini fingið greiði á, um man vildi tað.

# Sjálvandi tosaði eg við flokkin

**Løgmaður dugir ikki at síggja nakað ónáttúrligt í, at hann tosaði við Fólkaflokkin, áðrenn Jógvan við Keldu varð loystur úr starvinum sum landstýrismaður**

LANDSTÝRISMAÐURIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Løgmaður heldur, at tosaði hann ikki við Fólkaflokkin, áðrenn Jógvan við Keldu varð loystur úr starvi, so vildi talan verið um skeiva mannagongd*

Tað vóru hørð orð, sum Jógvan við Keldu hevði at siga um løgmann, tá føroyingar sóu - og hoyrdu - Dag og Viku hóskvøldið. Serliga ljóðaði tað ógvusligt, tá fyrrverandi landstýrismaðurin staðfesti, at um løgmaður hevði nakran rygg, so tosaði hann við seg, heldur enn at tosa við Fólkaflokkin um at fáa landstýrismannin at siga sessin frá sær.

### Sjálvandi var Fólkaflokkurin við

Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, dugir tó ikki at síggja nakað sum helst ónáttúrligt í tí, at hann samskifti við Fólkaflokkin, áðrenn uppsøgnin varð sett í verk.

- Tað er eingin ivi um, at tað er løgmaður, sum setir landstýrismenn og loysir hesar úr starvi. Men tað er heldur eingin ivi um, at samgongan er samansett av trimum flokkum. Og hóast løgmaður hevur endaliga orðið, so er tað eisini ein sjálvfylgja, at tað er í samráð við flokkarnar, at ymsu landstýrisumboðini verða vald, sigur Jóannes Ejdesgaard.

- Tí vil tað altíð vera so - uttan mun til um talan er um Jógvan við Keldu ella aðrar landstýrismenn - at tað verður samskift við flokkin, um tað vísir seg neyðugt at gera broytingar í landstýrinum. Undantøkini eru sjálvandi, tá okkurt mál gerst somikið akutt, at ein landstýrismaður skal sigast úr sessinum her og nú, men tað var talan so ikki um hesaferð, heldur hann.

### Álitið kundi verið betri

Sjálvur sigur Jógvan við Keldu, at hann ikki hevur fingið nakra grundgeving fyri, hví hann er loystur úr starvinum, og løgmaður staðfestir eisini, at talan ikki er um nakað einstakt mál, sum hevur ført til hetta.

- Talan er um eina heildarmeting av støðuni. Vit hava yvir eina tíð mett um støðuna í hesum málinum. Og niðurstøðan er, at har hevur verið ov nógvur ófriður um fleiri mál, og í longdini kann hetta ganga út yvir virkisførið hjá landsstýrinum.

- Tú skalt eisini minnast til, at Innlendismálaráðið umsitur eitt breitt og komplekst málsøki. Har er ein røð av fleiri ymiskum viðurskiftum, so sum lógarsmíð, úlendingamál, samferðsla og kommunur. Tí stendur ráðið eisini fyri nógvum stórum avbjóðingum komandi tíðina, og í hesum halda vit tað hava alstóran týdning við arbeiðsfriði og álitið.

*Vilt tú við hesum siga, at tú hevur mist álitið á Jógvani við Keldu?*

- Tað kundi í øllum førum verið munandi betri. Bæði í landstýrinum, í løgtinginum og millum manna. Skulu vit hava eina støðuga menning, so er neyðugt við áliti og virkisføri, og í heildarmetingini av hesum er okkara niðurstøða, at ein broyting í landstýrinum kann betra um hetta, staðfestur løgmaður.

Jóannes Ejdesgaard leggur afturat, at tað ikki er nakað einstakt mál, sum hevur vigað tyngri enn onnur í hesi heildarmeting.